VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Lot til andøvsgul av útsynningi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 10 og 13 stig.



Veðrið hósdagin:
Fyrrapartin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av eystri og regn ella mjørki. Hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og suðri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 14 stig.

Thordur vann Suduko-kappingina

Hann er vanur við at fylla út lepar. Thordur Thorsteinsson hevur nú í eina tíð virkað sum parkeringsvørður í Havn, og tí er ikki frítt, at fólk kennast við mannin. Tað eru tó ikki bara eyðkendu bláu leparnir, sum av og á verða hongdir á forrútin, sum Thordur er vanur at fylla út.

Hvønn morgun hevur hann eina Suduko-gátu at loysa aftur við morgunmatinum, og er hendan ikki loyst, áðrenn arbeiðsdagurin byrjar, er okkurt ítrivið eftir til kvøldarnar eisini.
Og nú kann Thordur so eisini staðfesta, at
talan kann verða um lønandi ítriv. Millum mongu seðlarnar, sum vórðu drignir fyri innsendu Suduko-loysnirnar í august mánaði, var navnið hjá Thordi drigið úr poasanum. Og fyri hetta fær hann eitt vikuskifti fyri tvey á Hotel Føroyum, umframt at bowling eisini kann setast á skránna hetta kvøldið.

Og so heldur Suduko-kappingin her í blaðnum annars fram. Vinningurin í september mánaði veðrur sostatt ein fartelda, og er tað Formula.fo, sum letur hesa.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	--
Nuuk	4
Qaqortoq	6
Ammassalik	--
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	10
Seyðisfjørður	11
Tórshavn	10
Lerwick	12
Aberdeen	19
London	24
Tromsø	--
Bergen	11
Oslo	--
Stokkhólm	16
Keypmannah.	15
Helsinki	16
Moskva	16
Berlin	21
Warzawa	18
Kiev	17
Bukarest	23
Paris	28
Madrid	32
Róm	28
Malorca	28
Athen	29
Malta	30
Tunis	30
Beijing	25
New Dehli	33
Bangkok	29
Jakarta	31
Sydney	15
New York	31
Miami	24
Los Angeles	19
Meksikobýur	31
Panama	15
La Paz	14
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	15

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 989 hPa. við Hebridurnar fer í landnyrðing. Brúgvalagið við Føroyar fer spakuliga norðureftir. Ódnin "GORDON" á 38N-43V fer eystireftir.



Í dag:
Lágtrýstið við Føroyar fer í landnyrðing. Lágtrýstið vestan fyri Spania – ex "GORDON"- fer móti Bretsku Oyggjunum.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 6/9 kl. 06^{00}– 7/9. 06^{00}. Hitin í gjár: 9,9°
Minsti hiti máldur í september: - 0,5° - Mesti hiti máldur í september: 19,5°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 6/9 kl. 06^{00}– 7/9 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í september: 0,0 mm

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

Sosialurin

VESTFALLSKYRRINDI

22. september Tendring / Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/ Vágafirði fp.	Suðuroyar-/ Vágafirði sp.	Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp.	Hestfirði/ Sundalagnum fp.	Hestfirði/ Sundalagnum sp.	Vestmanna-sundi fp.	Vestmanna-sundi sp.	Mykines-firði fp.	Mykines-firði sp.	Nólsoyar-firði fp.	Nólsoyar-firði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp.	Hvanna-sundi fp.	Hvanna-sundi sp.	Fugloyar-firði fp.	Fugloyar-firði sp.
19. Sept	05.25	17.46	04.25	16.46	04.40	17.01	07.25	19.46	08.25	20.46	03.40	16.01	02.40	15.01	05.40	18.01	06.40	19.01	05.10	17.31	06.25	18.46
20. Sept	06.06	18.26	05.06	17.26	05.21	17.41	08.06	20.26	09.06	21.26	04.21	16.41	03.21	15.41	06.21	18.41	07.21	19.41	05.51	18.11	07.06	19.26
21. Sept	06.45	19.05	05.45	18.05	06.00	18.20	08.45	21.05	09.45	22.05	05.00	17.20	04.00	16.20	07.00	19.20	08.00	20.20	06.30	18.50	07.45	20.05
22. Sept	07.24	19.44	06.24	18.44	06.39	18.59	09.24	21.44	10.24	22.44	05.39	17.59	04.39	16.59	07.39	19.59	08.39	20.59	07.09	19.29	08.24	20.44
23. Sept	08.01	20.19	07.01	19.19	07.16	19.34	10.01	22.19	11.01	23.19	06.16	18.34	05.16	17.34	08.16	20.34	09.16	21.34	07.46	20.04	09.01	21.19

5 707265 100036 >